# Hungureingilin



## Tann týsk-rumenski rithøvundurin Herta Müller lýsir tað stalinistiska einaveldið við eini skriving, sum er samanrikin, lýrisk og surrealistisk

PORTRETT
*Hanus Kamban*
*Kirsten Brix*

### Politiskur høvundur

Í dag, tann 10. desember, fær ein týsk-rumensk kvinna, klænvaksin og lítil, við stórum lýsandi eygum, nobelvirðislønina í bókmentum. Hon eitur Herta Müller, er fødd í 1953 og uppvaksin í bygdini Nitzkydorf í tí týska landspartinum Banat í Rumenia. Í 1987, tvey ár áðrenn ríkið hjá Ceausescu fall, flýddi hon til Týsklands, og hon býr nú í Berlin. Hon hevur skrivað 25 bøkur. Tann seinasta, skaldsøgan *Atemschaukel* (Andareiggjan), kom í ár og verður nú umsett til heimsins høvuðsmál.

Herta Müller er ein í odd og egg politiskur rithøvundur. Á ungum árum róði hon andróður móti tí kommunistiska stýrinum í Rumenia. Hon kom upp í Aktionsgruppe Banat, ein bólk, sum virkaði fyri frælsi og fólkaræði í tí týska landspartinum. Tá ið tann rumenska loynitænastan *Securitate* royndi at fáa hana at njósnast fyri seg, noktaði hon.

Hon gjørdist av hesi grund óynsktur persónur í Rumenia, misti sítt arbeiði á eini verksmiðju og føldi, við sínum viðkvæma sinni, at tað ríkið, hon var borgari í, í síni grund var meinlíkt tí týska naziríkinum, sum fall í 1945. Sjálv sigur hon:

> *Alt tað, sum eg helt hava týdning í lívinum, alt sum eg vildi vera, var forboðið. Og alt, sum ríkið beyð mær í staðin, vanvirdi eg.*

### Angistin og træmálið

Longu við síni fyrstu bók, *Niederungen* (Lágmark), gjørdi Herta Müller uppreistur, í hesum føri móti teimum svabisku bókmentunum í Banat, við teirra tjóðskapi og afturhaldi. Tá ið bókin kom út, spýttu fólk í heimbygdini eftir henni, og hárskerin sýtti fyri at klippa abba hennara.

Hon kom soleiðis, sum aðrar bøkur komu út, at hava bæði sítt týska heimland og tað totalitera Ceausescu-stýrið ímóti sær. Angistin var allastaðni, ein angist, sum dreiv inn í merg og mønu, drap alt lív, gleði, vinskap, kærleika. Í hesi støðu bleiv skaldskapurin, skrivingin, einasti útvegur, ein

> *lykil, sum ein kann heingja sínar dagar á, eisini um eg veit, at tað ikki broytir lívsins veruligu hendingar. Tað finnast bøkur, sum geva einum henda møguleika, tær hjá Paul Celan, hjá Thomas Bernhard ... Eg vildi liva og vera soleiðis, at eg kundi vera vinur hjá teimum, eisini um teir vóru deyðir ella eg ikki hevði kent teir. Eg leit á, at teir tóku undir við tí, eg skrivaði. Eg spurdi teir, innantanna: "Riggar hatta? Er tað gott?"*

Tey, sum hava lisið Paul Celan, vita, at hansara skaldskapur tók seg upp sum eitt slag av glíming við eitt týskt mál, sum nazistarnir høvdu spilt. Nakað tað sama kann verða sagt um málið hjá Hertu Müller, munurin er bara, at í hesum føri hevði tað totalitera Ceausescu-valdið, við sínum hugmyndafrøðiliga "træmáli", skapt ta málsliga spilluna.

> *Eg fekk djúpa andstygd fyri træmálinum. Har var ein gjógv millum hetta orðabraskið um framburð og um fólksins lukku og so hesi menniskjuni, sum ein sá ganga til grundar.*

### Týskarar burturfluttir

Í eftirskrift síni til skaldsøguna *Atemschaukel* skrivar Herta Müller, at Rumenia var sameindur hjá Týsklandi undir 2. veraldarbardaga til 1944, tá ið tað gav seg yvir til tann reyða herin og síðan fór upp í kríggið móti Nazitýsklandi.

Í januar 1945 kravdi tann sovjetski herovastin Vinogradov vegna Stalin, at allir týskarar, sum vóru búsettir í Rumenia, afturfyri skuldu sendast til Sovjetsamveldið at byggja tað krígsherjaða landið uppaftur. Allir menn og allar kvinnur millum 17 og 25 ár í hesum fólkabólki vórðu tá tvingilsflutt í sovjetskar arbeiðslegur. Tað er søgan hjá hesum fólkum, Herta Müller lýsir í skaldsøguni.

Innihaldið í skaldsøguni byggir á samrøður við fólk úr hennara egnu heimbygd, mamma hennara var eisini fimm ár í arbeiðslegu, men høvuðskeldan er Oskar Pastior, sum hon upprunaliga ætlaði at skriva skaldsøguna saman við. Men hann doyði óvæntað í 2006, so úrslitið bleiv, at hon burtur úr tilfarinum skrivaði skaldsøguna um tann unga mannin, sum 17 ára gamal saman við 100-tals øðrum verður fluttur við toki, í kríatúrvognum, til eitt ókent stað í Sovjetsamveldinum, har hann er í fimm ár.

### Tvífalt útlagin

Leopold Auberg, sum tann ungi høvuðspersónurin í skaldsøguni eitur, er, tá ið boðini koma, ikki ónøgdur við at verða sendur burtur. Góðtrúgvin sum hann er, sær hann hetta sum ein møguleika til at sleppa burtur úr bygdini, har "allir steinar høvdu eygu". Og, hugsar hann, verður tað ikki ov ringt, er tað kanska gott fyri meg. Hann er nevniliga samkyndur, og hetta var tá, og líka til 1968, í Rumenia tað sama sum at vera brotsmaður. Varð hann tikin, hevði revsingin verið í minsta lagi fimm ára fongsul:

### Uppteljingin

Um kvøldið var uppteljing á appellplássinum. Har stóðu tey burturfluttu ofta nógvar tímar, deyðakomin av møði og hungri, í neyðarsligum kloddum, í øllum veðri, meðan upptalt varð umaftur og umaftur.

> *Eg vandi meg til, tá ið uppteljing var, at gloyma meg sjálvan við at standa stillur og ikki at skilja tað at anda inn og anda út sundur. Og at snara eygunum uppeftir uttan at lyfta høvdið. Og at finna eitt horn av einum skýggi á himlinum, sum ein kundi heingja síni bein á. Tá ið eg hevði gloymt meg sjálvan og funnið tann himmalska krókin, helt hann mær føstum. Ofta var einki skýggj, bara líkasælt blátt sum opið vatn.*
> *Ofta var bara samdrigið, líkasælt grátt.*
> *Ofta runnu skýggini, og eingin krókur stóð stillur.*
> *Ofta brendi regnið í eygunum og klistraði mær klæðini at húðini.*
> *Ofta beit frostið mínar innvølir sundur.*
> *Sovorðnar dagar snaraði himmalin mínum eygum uppeftir, og uppteljingin togaði tey niður – beinagrindin hekk uttan hald bara í mær einsamøllum.*